Útbjóðing

Felagsskúlin Oyrarbakki
Um- og útbygging

Fyri Felagsskúlan verður arbeiðið við umvæling av fimleikahøll, umklæðing og svimjihøll boðið út alment.

Umvæling av fimleikapartinum er liður í størri stigvísari ætlan, har allur skúlin verður umvældur og útbygdur.

Talan er um høvuðsarbeiðstøku, meðan instalatiónsarbeiðini verða í fakentreprisu.

Soleiðis er arbeiðstøka:
1. Jørð, betong, timbur, snikkara, múrara og málaraarbeiði.
2. HVS - ventilatión.
3. El-arbeiðið.

Útbjóðingartilfarið (tilskilað arbeiðstøkað 1, 2 ella 3), kann verða umbiðið til mánadagin 5. apríl, og fæst móti 5.000 kr. í veð við krossaðum kekki, við at venda sær til teknistovuna **A3** við Norðskála.

Boð skulu saman við útbjóðingartilfarinum latast inn á teknistovuna **A3** í afturlatnum brævbjálva merktur »Felagsskúlin« í seinasta lagi **týsdagin 11. mai 2004, kl. 10.00.**
Boðini verða tá latin upp, og kunnu teir bjóðandi vera hjástaddir.

A3 spf, v. Hans Dávid Dam
Norðskálavegur 50
460 Norðskáli
Tel 422562

Selmar Nielsen Arkitektur Spf
Nicolai Mohrs gøta 2
188 Hoyvík
Tel 354812

Vit selja
DAEWOO
Skips motorar

FRÁ 20 HK TIL 1000 HK



GENERATORAR · STÝRIMASKINUR

TILBOÐ:
320 HK BÁTAMOTORUR
Prísur u/mvg 100.000 kr.

Umboð:
Thorleif Samuelsen
Undir Gráasteini 68 · 100 Tórshavn
Tel 317713 · Fartel 283138

WWW.SMYRIL-LINE.COM

Søkt verður eftir leiðara til Flogdeildina hjá Smyril Line

Smyril Line søkir leiðara til flogdeildina á høvuðsskrivstovu okkara í Tórshavn at taka við skjótast til ber.

Flogdeildin er ein sjálvstøðug eind, ið veitir tænastur til tey av viðskiftafólkum okkara, ið ynskja at ferðast við flogfari. Tað snýr seg um bílegging av flogferðaseðlum (til rutu- og leiguflogfør), og møguliga bílegging av tokferðaseðlum og hotellgisting í samband við ferðina.

Leiðarin á flogdeildini hevur ábyrgdina av:
- Avgreiðslu av viðskiftafólki á skrivstovuni og um telefonina
- Skipan av starvsfólki á flogdeildini
- Útvegan av ferðaseðlum
- Avrokning við BSP/Flogfeløg o.s.fr.

Vit væntа, at tú ert tænastuhugað/ur, ágrýtin, sjálvstøðug/ur, og at tú hevur royndir við nýtslu av bíleggingarskipanum til flogfør (vit nýta Amadeus-skipanina). Vit leggja dent á, at tú eisini hevur førleika til at menna starvsfólkini.

Leiðarin kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við leiðslubólkin á sølu & marknaðardeildini, og vit væntа, at tú hevur góð samstarvsevni.

Lønarsáttmáli við atliti til útbúgving og persónligan førleika.

Umsóknarfreistin er týsdagur 13. apríl 2004. Umsókn, prógv og onnur skjøl skulu sendast til:

Smyril Line
Postsmoga 370
FO-110 Tórshavn

Merk brævið »Leiðari á flogdeildini«

Ella við t-posti til ***njk@smyril-line.fo***

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Sølu- og Marknaðarstjóra,
Niels Kreutzmann, á tlf. 345939.

J. Broncks gøta 37 · Postsmoga 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · office@smyril-line.fo

Til sølu

Fiat Stilo Sport 1.8, 133 HK
árg. 2002, koyrt 25.000 km, til sølu vegna flyting.

Tlf. 222355 ella 519927

WWW.SMYRIL-LINE.COM

Innkeypsleiðari til Smyril Line

Søkt verður eftir innkeypsleiðara til Smyril Line

Starvið umfatar alt innkeyp til felagið.

Viðkomandi skal hava útbúgving og royndir innan keyp og sølu í handilslívinum, skal hava góðan teldukunnleika, duga enskt í skrift og talu.

Hava góð samstarvs- og samráðingarevni.

Løn sambært avtalu.

Umsókn við prógvum og upplýsingum um royndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 13. apríl 2004 og skulu stílast til:

Smyril Line
Stjórnin
Postsmoga 370
110 Tórshavn

J. Broncks gøta 37 · Postsmoga 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · office@smyril-line.fo

Gallarí Jinx

Framsýning við
Anniku á Lofti í apríl

"Unga Annika á Lofti verður helst ársins kjakevni við spennandi verkinum Oljan og Vinnan"
- Sosialurin 24. juli 2003

"Annika á Lofti hevur gjørt eksperimenterandi list, ið er sera spennandi listarligt avrik"
- Dimmalætting 23. juli 2003

Sosialurin 341600

tel 317101 · jinx@jinx.fo

mbf

Aðalfundurin 2004

Aðalfundurin hjá MBF verður leygardagin tann 15. mai kl. 14.00 í Pálsstovu

Skrá samb. viðtøkum felagsins.

Mál at leggja fyri aðalfundin og uppskot til nýggjan formann og starvsnevndarlim til sálarliga/neurologiska bólkin og til medisinska bólkin skulu vera starvsnevndini í hendi 3 vikur áðrenn aðalfundin, t.v.s. fríggjadagin 23. apríl 2004.

Allir limir eru vælkomnir til aðalfundin.

Starvsnevndin

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Tórshavnar Musikkskúli

er týdningarmikil liður í mentanarlívinum í høvuðsstaðnum.

Umframt at vera ein blómandi skúli, er Musikkskúlin eisini vakstrarhús hjá ungdómi, sum í framtíðini fer at mynda tónleikalívið í høvuðsstaðnum. Eisini er Musikkskúlin arbeiðsplass hjá tónleikarum og lærarum við altjóða útbúgvingum og royndum.

Umleið 855 næmingar og 32 lærarar eru í skúlanum.

Tórshavnar Musikkskúli er kommunalur skúli, ið hevur eina musikkskúlanevnd, sum skipar skúlan. Mentamálanevnd býráðsins ger figgjarætlan fyri skúlan.

Skúlin húsast á Frúutrød og í Skansastovu, Yviri við Strond og hevur skrivstovusamstarv við Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla.

www.torshavn.fo

Leiðarastarv til Tórshavnar Musikkskúla

Starvið sum leiðari fyri Tórshavnar Musikkskúla er leyst frá 1. august 2004.

Undir ábyrgd leiðarans í mentamáladeildini í Tórshavnar kommunu skal leiðarin hava dagligu leiðsluna av Tórshavnar Musikkskúla.

Tórshavnar Musikkskúli er partur av føroysku musikkskúlaskipanini, og leiðarin skal samstarva við musikkskúlastjóran í Mentamálaráðnum, ið hevur námsfrøðiligu ábyrgdina av undirvísingini.

Søkt verður eftir leiðara, sum:
- hevur leiðslu-, samstarvs- og fyrisitingarligan førleika umframt innlit og royndir í figgjarstýring
- hevur hugsjónir og virkisfýsni at leggja til rættis og fremja verkætlanir, ið Musikkskúlin skipar fyri
- dugir væl at samskifta í skrift og talu bæði innanhýsis og uttanhýsis
- við eldhugi hevur hug at standa á odda fyri og miðvíst útbyggja tónleikatilboðini í Tórshavnar kommunu og menna býin sum mentanarbý
- er málsøkin og til reiðar at menna Musikkskúlan í tøttum samstarvi við yrkislærdum lærarum, borgara og býi at gagni

Førleikakrøv
Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving í tónleiki og námsfrøðiligar royndir.

Lønar- og setanartreytir
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Musikklærarafelag.

Meiri fæst at vita
frá Jákupi Simonsen, leiðara í mentamáladeildini, telefon 315160, teldupostur: jakup@torshavn.fo

Umsóknir
og møguliga upplýsingar um útbúgving, viðmæli og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 19. apríl 2004.
Viðmerkið umsóknina: Tórshavnar Musikkskúli.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Tórshavnar Kvøld- og Ungdómskúli og Tórshavnar Listaskúli

eru frítíðarskúlar undir býráðnum, sum hava tilboð til borgaran um undirvísing eftir arbeiðstíð, og stór tilgongd er til allar lærugreinirnar.

Her er talan um handverk og handarbeiði av ymiskum slag, bóklig undirvísing, tilboð til rørslutarnað og menningartarnað, frítíðarvirksemi til børn og ung og mangt annað.

Í skúlanum ganga yvir 3.000 næmingar, og har starvast um 200 lærarar.

Skrivstovan er á Frúutrød saman við skrivstovuni hjá Tórshavnar Musikkskúla.

www.torshavn.fo

Leiðarastarv til frítíðarundirvísingina

Starvið sum leiðari fyri frítíðarundirvísingina í Tórshavnar kommunu, Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla er leyst frá 1. august 2004.

Undir ábyrgd leiðarans í mentamáladeildini í Tórshavnar kommunu skal leiðarin hava dagligu leiðsluna og fyrisitingina fyri allari frítíðarundirvísing í kommununi.

Søkt verður eftir leiðara, sum:
- hevur hug og hegni at leiða, dugir at samstarva og er fyrikomandi
- hevur fyrisitingarligan kunnleika og hug og hegni at átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- er námsfrøðiliga og undirvísingarliga nýskapanarsinnaður
- er førur fyri at menna frítíðarundirvísingina og skipa undirvísingarliga tilboðið til tørvin hjá borgarunum í kommununi
- er kveikjandi í sínum arbeiði í frítíðarundirvísingini
- á fólkaræðisligum støði skal fremja góðar arbeiðsumstøður og menna samstarvið millum næmingar, lærarar og onnur samstarvsfólk
- er førur fyri at skilja støðuna hjá øðrum og dugir at loysa trupulleikar
- kann skapa virðing fyri skúlanum og umstøðunum hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd
- tolir broytingar starvinum viðvíkjandi

Førleikakrøv
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalærara- ella aðra samsvarandi útbúgving og fyrisitingarligar royndir.

Lønar- og setanartreytir
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

Meiri fæst at vita
frá Jákupi Simonsen, leiðara í mentamáladeildini, telefon 315160, teldupostur: jakup@torshavn.fo

Umsóknir
og møguliga upplýsingar um útbúgving, viðmæli og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 19. apríl 2004.

FFK

Føroya Felag Móti Krabbameini

Aðalfundur felagsins verður á Hotel Hafnia týsdagin 20. apríl 2003 kl. 19.00.

Skrá sambart lógum felagsins.

Eftir aðalfundin, heldur Karen Heinesen, sosialráðgevi fyrilestur um Rehabilitering av krabbameinssjúklingum.

Mazda B2500 til sølu

Vegna tryggingarfelagið Trygd selja vit skaddan Mazda B2500 4x4 pick up. árg. des. 2003.

Berg Motors, tlf. 313535

Almanna- og heilsurøktarafelagið

Aðalfundur

Aðalfundur felagsins verður 27. apríl 2004 kl. 9.30 á Hotel Føroyum.

Skrá, samb. lógum felagsins.

Nevndin

Handilshøli í Vágum til leigu

Góð og kundavinarlig handilshøli til leigu.

Hølini standa væl fyri og eru í góðum handilsumhvørvi.

Hevur hetta tín áhuga, ert tú vælkomin at skriva til:

Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn
Bill. mrk. 732

Cvof_fippqÐos

L vddg^ibfßfo

4ła[Ñ i [Ó } łĹełłĹ[ĹĹJÉÍ[ÓĹ`§ÞĹ[ÓĹþç Ì łĹ[Ĺ < ĜÌ łÓ§ałß łłłÓ[łĹeßþłłełłĹ Ã§łeÑĜçÌ ÓĹß`ĆłþĹ^ÓÍÌ łĹĹłÍĹĹĹłłłłłĹ[þłÌ §łłłłĹáłĹÑ [łĹ¯ĈáłĹ[ë»ëłĹĹdĜÇ¹ î

PqÐosfkf cbsk^ r j
L.[łĹ[ÓĹ§þĹĉëÑĹĹĉþĝĉłĹçþęłĹJ Ì łĹé[þłĹÚ»łĹłĹĉĝþłÑ§ÓÓî

MoÉds,cÐoibfh^hoÐs
rĹJL ' T{\Ĺ§ÌÓ[łĹełłÓÓë łþ `eĹłëÑĜłĹÌ łĹé[þłĹ
ĹĹĹ§ÍÍ[ĹłĹĉĝþłÑ[łłëþĹełłĹłĹÃ[Ó}łłãłÌ łĹëÑ
rĹ 2 §łłãëéþÚ»eĹÌ[»Ĉ`Ó[łĹĹ[
rĹĜpÚ»eĹĹÓĝĹłĹëĹ[eĹłłĹ[þ»łÓ»[þĚĹ»§þłł

ÓÓ[þĹĉþÚłÓ[łełłĹełłłłĹ[łĹĹĹĚĹĹÃ§ëëþĹ»Ú łĹłĹ[ÑłĹĉ[þëã§eÓłłĹ) ë»łþĹ[ĹĹ
[þłłłĹ[łĹĹ łĹeĹĹçłłë»łĹĹ§þĹĹÌ łëÓ}[ełÓ[þłĹ»łĹëþĹÚ»ĹçÌłłÓî

N ÑãçÌ łĹ[þ[þĹłłłĹÃ[eł[łĹłłłłłłĹ[ëł»ełÓ»[þãÌ §łłłĹÃ[eł[łĹĜpłÑëÓî

Pbq^k^oqobvqfo
J§Ĺ[Ó[þĹĉ§ĹĹĉĝĉłę§þłłĹ[łĹ[Ñłłłłłł